# B36-piltarnir í Danmark

**B36 piltarnir vunnu silvur í Brande Cup 2002 seinasta vikuskiftið, og tveir spælarar vórðu heiðraðir**

UTTANLANDSFERÐ
*Páll Holm Johannesen*



*Allir 31 B36-piltarnir samlaðir uttanfyri skúlan, har teir gistu*

Seinasta vikuskiftið luttóku tvey piltalið hjá B36 í Brande Cup í Jútlandi. Vanligt er, at ítróttarfeløgini gera uttanlandsferðir við ungdómsliðum júst hesa tíðina av árinum. Liðini plaga at vera burtur í eina góða viku, og kappast verður við javnaldrar úr fleiri londum.

B36 hevur gjørt uttanlandsferðir við ungdómsliðum í eini 12-15 ár, og aftur í ár hevði felagið valt at lata piltarnar fara uttanlands. Endamálið við uttanlandsferðunum er bæði at samansjóða tey ungu, og at leikarnir sleppa at royna seg ímóti javnaldrum frá øðrum londum. Umframt teir dagligu dystirnir, verða útferðir gjørdar við spælarnum. Stuttleikalundirnar, so sum Legoland og Sommerland, eru vælumtókt vitjanarstað hjá teimum ungu, so hagar gongur ofta leiðin hjá ítróttarfeløgnum.

### Foreldrini skipa fyri

Í samband við uttanlandsferðirnar eru tað oftast foreldrini at børnunum, ið standa fyri fyrireikingunum. Foreldrini skipa ein sokallaðan foreldrabólk, og hesin skal so virka fyri, at pengar fáast til veða til uttanlandsferðina. Innsavningin fer fram við ymiskum tiltøkum, ið foreldrabólkurin stendur fyri. Tiltøkini fevna vanliga um lutseðlasølu, bingo, tombola og sum nakað nýtt, eru neytamykjukappingarnar eisini blivnar liður í innsavningini til uttanlandsferðirnar.

Umframt at hjálpa til við tí peningaliga, so plaga fleiri foreldur at fara við sum leiðarar. Vanliga er talan um ein stóran skara av ungum ítróttarfólki, so neyðugt er við nógvum hjálparfólki á sjálvum túrinum, og eisini har plaga foreldrini at taka eina hjálpandi hond við.

### Spældu seg fram í finaluna

B36 stóðu seg rættiliga væl í kappingini í Brande. B36 1 spældi seg heilt fram í finaluna, meðan tað gekk minni væl hjá B36 2, ið tapti allar dystinar í kappingini.

B36 1 endaði í bólki saman við donskum og týskum liðum, og har eydnaðist tað koma víðari sum nummar tvey. Leygardagin spældu B361 tríggjar dystir, og vunnu teir teir allar. Bæði í áttindapartsfinaluni og fjórðingsfinaluni vunnu B36 1 tepurt og hálvfinaludysturin gjørdist ein sannur gysari. Eftir at dysturin ímóti Lemvig GK endaði málleysur, var farið til brotsspørk, og havnadreingirnir vunnu 5-4. Í finaluni sunnudagin møttu B36-piltarnir B1921, og tá máttu teir lúta fyri spælarnum av Falster. Dysturin endaði 3-0 til B1921.

Karmarnir um finaluna vóru rættiliga stórsliðnir, í mun til hvat piltarnir eru vanir við. Nógvir áskoðarir vóru til dystin, og bara tað at leikarnir sluppu at marsjera inn á vøllin, og at nøvnini á vórðu rópt upp undan dystinum, blivu spælarnir rættiliga bergtiknir av.

### Tveir spælarar heiðraðir

Siður er í kappingini í Brande, at teir spælarnir, ið skjóta skjótasta mál og hava besta málmansavrikið, verða heiðraðir av fyrireikarinum. Skjótasta málið og besta málmansavrikið fall í ár B36 í lut. Í bólkaspælinum vunnu B36 1 tann eina dystin heili 14-0, og longu eftir 18 sekund, hevði B36 fingið mál. Brandur M. Nolsøe skeyt málið, og fekk hann eina ítróttartasku í heiðursgávu afturfyri. Ikki nokk við tí, tá kappingin var av, mettu fyrireikarnir, at B36-piltarnir eisini áttu besta málverja í kappingin. Henda heiðurin fekk Hanus Dahl Johannesen. Í heiðursgávu fekk hann einar málmanshandskar.



*B36 1 vann silvur í Brande Cup 2002, eftir at teir máttu lúta fyri B1921 í finaluni*

# Úttøkuvenjing til U19-landsliðið

Í samband við dystirnar í heyst, hevur U19-landsliðsvenjarin, Jógvan Martin Olsen, boðað frá úttøkuvenjing í næstu viku. Mikudagin 10. juli verður vant tvær ferðir á Svangaskarði, og hósdagin 11. juli venur U19-landsliðið í Gundadali. Í samband við venjingina hósdagin, skulu U19 og U17 landsliðini spæla innanhýsis dyst á Tórsvølli kl. 17.00.

**Hesir leikarar hava fingið boð um at møta:** Jann Ingi Petersen B68, Bjarni Jørgensen, Rókur Jespersen, Rani D. Christiansen, Eli Thorsteinsson, HB, Marni Djurhuus, Búgvi Øster, Hans Pauli Samuelsen, EB/Streym, Bárður Danielsen, Hanus Thorleifson, Áki Petersen, Skála, Mortan Johannesen, Bergur Midjord, B36, Høgni Madsen, Sverri Ellingsgaard, ÍF, Kai Ennigarð, Magnus Skoralíð, GÍ, Rasmus Nolsøe TB, Justinus R. Hansen NSÍ, Símun Samuelsen, Allan Kjærbo VB, Ingi Højsted Arsenal.

**Leiðarar:** Jógvan Martin Olsen, venjari, Mathias Davidsen, Bill McLeod Jacobsen, Pætur Clementsen

# U17-landsliðið endaliga úttikið

Í samband kappingina um norðurlandameistaraheitið í Svøríki seinast í mánaðinum, hevur U17-landsliðsvenjarin, Bill McLeod Jacobsen, úttikið endaliga hópin. Í samband við fyrireikingarnar til kappingina fer U17-landsliðið at leika ein venjingardyst ímóti unglingunum hjá ÍF. Dysturin verður fríggjakvøldið 5. juli kl.19.00 í Fuglafirði.

NM-kappingin verður í svenska býnum, Luleå, og føroyingarnir eru endaðir í bólki við Onglandi, Noreg og Svøríki.

**Leikskrá:**

| | |
|---|---|
| 30. juli | Ongland-Føroyar |
| 31. juli | Noreg-Føroyar |
| 02. august | Svøríki-Føroyar |
| 03. august | finaludystur |

**Føroyska U-17 landsliðið sær soleiðis út:** Gunnar Nielsen, Svenn Dam Jacobsen, Emil N. Leifsson, Páll M. Joensen, Jónas Tór Næs, Johan Mouritsen, HB, Heini Kristiansen Skála, Símun Louis Jacobsen GÍ, Fritleif í Lambanum ÍF, Justinus H. Hansen NSÍ, Ragnar Mortensen TB, Poul N. Poulsen VB, Ovi Magnussen, Johan Petur Poulsen B68, Julian Samuelsen, Urbanus Olsen, Steffan Kallsø KÍ, Bogi Hermansen B36. Leiðarar Bill McLeod Jacobsen U17-landsliðsvenjari og Pætur Clementsen U17-hjálparvenjari



VIÐMERKINGAR

# Hin burturvilsta Heimamissiónin

**John S. Myllhamar**



Náttúrliga átti innlegg sum hetta at staðið í málgagninum hjá Heimamissiónini, "Trúboðin", men tann ódemokratiska kós, sum blaðið liggur á, loyvir ikki øllum at koma við meiningum, atfinningum ella rættleiðingum, og tykist tað heldur pravdaiskt, tá ið øll verðslig dagbløð annars loyva tí.

Ein kirkja hevur ymiskar arbeiðsgreinar. Soleiðis eisini okkara føroyska kirkja. KFUM & K, Blái Krossur, Bróðurringurin á Havinum, sjómansmissión, heidningamissión og skótaarbeiði eru nakrar av funktiónunum. Hetta er alt arbeiði, sum kirkjufólkið á ymiskan hátt ger, kennir kall til, og dugir at skilja ímillum hvat er hvørt. Blái Krossur hevur ikki sítt arbeiði millum sjómanskvinnuringarnar, líka lítið sum Bróðurringurin á Havinum hevur sína funktión í skótarørðsluni.

Eisini Hin Kirkjuliga Heimamissiónin í Føroyum (hereftir HM) var ein arbeiðsgrein í kirkjuni, lík teimum, sum nevndar eru omanfyri. Hennara uppgáva og einasta endamál var, sum eisini liggur í navninum, og sum tað stendur, ella í hvussu so er hevur staðið í lógskipanini: "... at starvast fyri at vekja upp trúarlívið og menna felagsskap teirra trúgvandi ...", Talan er um, millum kirkjufólkið heima í Føroyum. Til hetta arbeiði veitir kirkjufólkið stuðul til HM. Og til at fremja hetta arbeiði, hava flestu missiónshúsini kring landið skrivað undir at vera við í arbeiðinum. HM skuldi ikki vera ein kirkja, sum hevði aðrar greinar undir sær.

**Heimamissiónin við kirkjuligari funktión.**

Men nú er farið undir at raðfesta onnur ting, ma. at dríva heidningamissión, sum er eitt heilt annað arbeiði - í heidningalondum.

Tey í okkara landi, sum kendu kall at fara út í heidningalond við gleðiboðskapinum, vóru útsend frá kirkjuni; so stóð kirkjufólkið, íroknað missiónsfólkið, aftanfyri hesi við forbøn og fíggjarligum stuðli. Men nú hevur HM tikið sær eina kirkjuliga funktión, ið innsetur heidningatrúboðarar, sum als ikki er hennara borð, tá ið hon ikki er (ella var) ein kirkja. (Mær vitandi eru tað bara prestar, sum verða innsettir, trúboðarar vera útsendir) Heidningamissiónin ger arbeiði sítt soleiðis sum tað skal vera gjørt, og har tað eigur at vera gjørt.

Men løgið, samstundis sum farið er undir at dríva og raðfesta heidningamissión, gremja somu persónar seg um, hvussu illa stendur til við kirkju okkara her heima. Her haltar.

**Luthersmissiónkir og karismatiskir tendensir**

Luthers Missión hevur sæð hesar missiónsgreinar, úti og heima, sum eitt og tað saman, eins og ymisku samkomurnar gera, tí teir síggja tað frá einum sjálvstøðugum kirkjuligum sýni. Luthers Missión er ikki ein arbeiðsgrein í kirkjuni á sama hátt sum HM. Hóast hon byggir á evangelisk luthersku læruna, er hon bæði lá- og ókirkjulig og hevur altíð mett seg meira sum ein samkoma, serstakliga seinastu árini. Tað gevur seg til kennar við eitt nú altargangi í missiónshúsum, enntá uttan prest, og einum eftir okkara tykki ógreiðum sýni í spurninginum um endurføðing. Altargangur uttan fyri kirkjuna hevur til hendan dag í HM verið mett sum kirkjubrot.

Tað ið eisini hevur eyðkent boðskapin í HM er, at vit gjørdist kristin í dópinum. Viltist ein burtur, men kom aftur, var sagt: Hann/hon vendu um. Tí var líknilsi um burturfarna sonin tað mest elskaða millum HM fólk. Hann, sum ikki vendi heim, men heimaftur. (sitat Carl Moe formaður)

Nú hevur HM nógvastaðni somu læru sum Luthers Missión og aðrar rørslur og samkomur, har fólk siga: Eg gjørdist ein kristin og var endurføddur tann ella tann dagin, eg vendi um.

Her hevur danska Indre Missión støðugt púra greiðar reglur bæði hvat meinigheit (kirkjuliði), endurføðing og umvending viðvíkur. Formaðurin Christian Poulsen hevur nýliga á ársmøtinum í Herning sligið hetta púra fast

Teir luthersk missiónsku og karismatisku tendinsir, sum eru í høvuðsstýrinum í HM í dag, hava ført missiónina inn á nýggja kós, og er tað harmiligt. Orðini hjá fyrrverandi formanninum Jóhan Weihe presti, sum søgd vóru í Havnar kirkju á einum ársmøti, eru møðuliga við at gerast veruleiki: "Tann dag Heimamissiónin er vorðin ein meinigheit, er hon ikki longur Heimamissiónin".

At HM var yvirtikin sum føroysk, havi eg eisini ein part av skyldini í. Metti at tað var rýmiligt og eisini praktiskum grundum gjørdist lættari at hava høvuðsstýrið í Føroyum. Men er hetta eitt av mongum mistøkum, ein havi gjørt.

**Øll hjartaliga vælkomin.**

"Øll eru hjartaliga vælkomin óansæð hvørja samkomu tey so hoyra til" Soleiðis ljóðaði innbjóðingin í einari útvarpssending fyri tíð síðani, hugsi tað var "Í víngarðinum"av onkrum, sum stóð fyri einum tiltaki í Nesvík.

Jú, øll hava altíð verið vælkomin til tey tiltøk HM hevur skipa fyri gjøgnum tíðirnar. Tað merkti kortini ikki, at so var vikið frá tí fólkakirkjuligu læruni, ella gjørd kompromis. Fólk vistu, at tey komu at hoyra bæði um dóp, altarborð og annað. Men í dag er hetta ikki longri tilfeldi. Ein prestur segði fyri mær ein dagin, at hann skuldi hava eitt evnið í Nesvík, og hevði hann fyrireika seg ma. at koma inn á sakramentini. Men har sótu so mong fólk úr øðrum samkomum, sum hann visti vóru heilt ósamd við sær, so hann visti ikki hvat hann skuldi gera.

Fyri at eingin misskiljing skal vera, skal gerast vart við, at eg havi vinir innan allar samkomur í Føroyum, men eg komi ikki á møti hjá teimum, líka lítið sum teir koma í kirkju við mær. Men vit virða hvønn annan.

Tey menniskjuni, ein hevur havt størstu trupulleikar av, eru tey, sum siga seg vera økumenisk á tí lága støðinum, sum vit kenna tvørkirkjuligt arbeiði í Føroyum, hvar tingini, sum skilja vera tagt burtur, heldur enn hildin fram, soleiðis, sum vit kenna tað á hægri støði ymsastaðni úti í heiminum.

Hvør læran í HM er, tykist vera líkamikið. Tað sæst best tá ið tú hyggur eftir hvørji verða send út, at hava eitt nú leiðaraskeið og at standa fyri ungdómslegum; persónar, sum einki hava við kirkjuna at gera og aldri koma har, men sum kenna seg meira heima í kariskatisku samkomunum. Úrslitið verður hareftir. Ungfólk okkara koma heimaftur við spurningum um dópin og aðrar lærusspurningar, sum tey eru vorðin anfektaði við av øðrum ungum, tey hava verið saman við á legum í HM - øll vóru jú vælkomin.

Alt hetta smittar so útaftur í smáu samfeløgini. Bæði eg og aðrir av mínum starvsfelagum hava verið álopnir í Missiómshúsum, tí vit í talum okkara komu inn á sakramentini. Tí er als ikki lætt at vera trúboðari í HM her heima, sum vit so hjartaliga hava brúk fyri. Tað hvílir alt ov stór byrða á teimum báðum trúboðarunum, sum eru eftir, og tað verður tvørligari hjá teimum at arbeiða tá ið nú høvuðsstýrið er farið at konsentrerar seg um heidningamissión og onnur ting.

**Skrivstovuveldi ella útiarbeiði**

Tað mikla skrivstovuveldi, sum ger seg galdandi í heiminum í dag, vindur eisini uppá seg innan kristiligt arbeiði, ikki bara í donsku fólkakirkjuni, sum vit sóu eitt grefligt dømi um í einari SV-sending nú eitt kvøldið, men eisini í HM ger hetta seg galdandi. Á mangan hátt er talan um ikki annað enn bert telduspæl. Hví ikki heldur leggja seg eftir at vitja fólk kring landið, sum sita einsamøll ella liggja sjúk? Her er nóg mikið at tríva í. Heldur brúka "ápostlarnar" og vera bunkarnar av pappíri fyri uttan.

Sjálvur var eg úti í eini djúpari psykiskari kreppu fyri nøkrum árum síðani og tók sera sterkan heiluvág. Tá troppaðu einstøk starvsfólk og leiðandi persónar í HM upp í heimi mínum, men ikki kann sigast teir høvdu serligt eyga fyri sálarrøkt, fyri umsorgan og fatan. Teir komu at moralisera. Var tað nøkrum, eg ikki hevði tørv á tá, so var tað moralismu. Hesum forstáilsi møtti eg haraftur-ímóti hjá prestum, sum als ikki vera góðkendir av høvuðstýrinum sum trúgvandi. Síðani kom eg á sjúkrahúsið og lá har í mánaðir, støðugt sum medarbeiðari í HM, men fekk hvørki vitjan ella heilsan frá nøkrum av hesum, hóast nakrir búðu bara eitt hanagleiv frá sjúkrahúsinum. Eftir at eg kom burtur úr hesi kreppu, havi eg hvørki sæð ella hoyrt til nakran av hesum aftur.

**Trúføst missiónsfólk harmast**

Komi so langt kreftirnar røkka, út til møtir og guðstænastur kring landið, serstakliga á smærri pláss. Havi tí nakað av føling við hvat rørir seg á teimum ymisku støðunum.

Spurdur av vinum í HM, um eg ikki hevði havt hug at byrjað aftur sum trúboðari, er svarið, at tað kenni eg meg ikki føran fyri. og um eg hevði vilja verið óløntur frítíartrúboðari er svarið: Eg hevði hvørki trivist ella verið góðtikin, men komið at kent meg fremmandan sum støðan í HM er í løtuni.

At trúføst missiónsfólk eru sera ónøgd við núverandi gongd, er væl skiljandi. Hin vegin kemur gongdin óiva væl við hjá teimum, sum stríðast fyri, og sum altíð hava mett HM at vera eina samkomu, og sum tosa um meinigheitinar í missiónshúsunum,

Gomlu HM fólkini eru tolin, og bøn teirra er, at vit mugu fáa Hina Kirkjuligu Heimamissiónina í Føroyum at virka aftur heima í Føroyum. Í løtuni eru bara heilt fáir heimamissiónsmenn limir í høvuðsstýrinum. Tí hendir tað ikki uttan allir høvuðstýrislimirnir eru reiðiligir móti endamálsgreinini í HM, annars áttu teir at latið onnur komið í teirra stað.

Tað er neyðugt við einum persóni við hegni og myndugleika, um HM skal vera lív laga sum fólkakirkjunnar missión her heima. Og tað verður ikki nøkur løtt uppgáva, hesin fær at lyfta.

At nógvir prestar seinastu árini, eftir at hava sitið stutta tíð í høvuðsstýrinum, eru farnir úr, eru vit hørm um, men vit skilja teirra grundgeving væl.

Heimamissiónin, hvørs uppgáva er, at leita eftir teimum burturvilstu, er í løtuni sjálv burturvilst. Tí má hon fyrst finna seg sjálva, fyri at kunna finna onnur.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!